Statoil hevur søkt um leitiloyvi á nýggjum øki

Jógvan Hugo Gardar

03.12.2015 - 14:22

Oljan.fo

Á fyrsta sinni síðani 1994 lata norskir myndugkeikar nú upp eitt nýtt leitiøki. Talan er um eitt øki sum liggur í landsynningspartinum av norska partinum av Barentshavinum. Talan er um eitt øki sum ósemja hevur verið við Russland um, men aftaná avtaluna í 2011, so er semja um hvar markið millum londini skal vera.

Talan er um 23 leitiumfar hjá norðmonnum. Statoil hevur saman við 33 feløgum kannað hetta økið, og nú heldur Statoil seg sita við so mikið góðari vitan, at felagið ynskir at sleppa at leita eftir kolvetni har.

Talan er um eitt øki sum umhvørvisfelagsskapir, sum til dømis Greenpeace, meina eiga at sleppa at fáa frið fyri oljuvirksemi.

Jez Averty, ið er stjóri fyri leitivirkseminum hjá Statoil á norska landgrunninum, sigur í einum tíðindaskrivi at tey meta at økið er sera áhugavert.

- Økini sum eru lýst leys nú eru áhugaverd, og vit vóna at vit kunnu byrja leitingina í 2017, sigur Averty.

Hann sigur eisini at fleiri ivast í um tað kemur at loysa seg at bora í útlýstu økjunum, men Averty sigur at tey trúgva at hetta kemur at loysa seg. Hann vísir á at Statoil arbeiðir við nýggjum tøkniligum loysnum sum fara at gera tað rímuligar fíggjarliga at fáa fartur á kolvetninum.